Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins:

# Binda alt landið saman

UNDIRSJÓVARTUNNIL
*Jan Müller*



-Vágatunnilin er ein ítøkiliggerðan av nøkrum, sum bara hevur verið í tonkunum hjá fleiri og fleiri fólkum tey seinastu 15-20 árini. Síggja vit fyri okkum kortið, sum Heine Olsen hjá Landsverkfrøðinginum gjørdi í síni tíð, so er hetta fyrsta dømið um, at slík ætlan verður sett í verk. Kortið var ein sambinding av okkara spjadda oyggjasamfelag til eina eind sigur Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, nú Vágatunnilin er vorðin veruleiki.

Høgni Hoydal roknar við, at líka stórt stig, sum Vágatunnilin er fyri Vágoynna, eins stórt verður tað fyri allar Føroyar. -Eg veit ikki um man kann samanbera hetta við, tá elektrisitetið kom ella tá farið varð undir at gera vegir. Men Føroyar verða í hvussu er ikki tær somu eftir hetta. Fer øll henda ætlan við at sambinda oyggjarnar at gerast veruleiki, so kann tað verða loysnin uppá, at vit framvegis kunnu hava eitt spjatt búsetingarmynstur í Føroyum og loysnin uppá, at man framvegis kann liva eitt nútímans lív í Føroyum uttan at liva í einum stórbýarsamfelag, og yvirhøvur kann tað geva so nógv størri mentunar- og vinnumøguleikar kring alt landið.

Høgni Hoydal ivast heldur ikki í, at tað verður farið víðari eftir hetta. -Um tøknin heldur fram at mennast - og tað ger hon uttan iva, og vit hugsa um teir fyrstu hvalbingarnar, sum man tók úr kolanámunum til at bora Hvalbiartunnilin, so stóðu teir við hondborum upp undir loft. Soleiðis



varð fyrsti tunnilin í Føroyum gjørdur - til ta tøknina, sum hon er í dag, so er tað als ikki fantastarí longur eisini at tosa um undirsjóvartunlar til Sands og Suðuroyar. Tað liggur tí í eini rímuligari framtíð. Tann stóra avbjóðingin fyri Føroyar er, at tá Norðoyartunnilin verður liðugur um eini 2-3 ár og koyrandi verður úr Gásadali til Viðareiðis, sum er ein kollvelting í sær sjálvum, tá verða Sandoyggin og Suðuroyggin í eini serstøðu í Føroyum, sum tær stóru oyggjarnar, ið ikki hava fast samband. Tað er tað vit mugu til at hugsa um í framtíðini: hvussu vit fáa Sandoynna og Suðuroynna at verða bundnar saman við restini av landinum.

Høgni Hoydal sigur annars, at hesar útbyggingar mugu gerast soleiðis, at tær samsvara við fíggjarorkuna í landinum, og mest umráðandi er, at alt ikki verður gjørt samtíðis.

Um týdningin annars, sum Vágatunnilin fer at hava sigur formaður Tjóðveldisfloksins: -Tað týdningarmesta uppá stutt sikt er, at Vágoyggin fær heilt nýggjar møguleikar fyri at menna seg. Uppá longri sikt er hetta byrjanin til eina nýggja tíð fyri øll økini í Føroyum.

## Størri vegakerv setur nýggj krøv

SAMFERÐSLU-MENTAN
*Jan Müller*



Um ikki so nógv ár verður samferðslumynstrið í stórum parti av landinum fullkomiliga broytt. Tá tunnilin til Gásadals er liðugur og koyrandi er undir Lorvíksfjørð, ber til at koyra av Viðareiði til Gásadals. Hetta verður ein stór avbjóðing ikki minst fyri tey mongu, sum kunnu hugsast at royna tað nógv økta veganetið og harvið síggja partar av landinum tey vanliga ikki røkka. Tað setur so eisini heilt nýggj krøv til okkara ferðslumentan. Í blaðnum í gjár legði Anfinnur Kallsberg, løgmaður stóran dent á, at samferðslukervið verður útbygt næstu árini við bæði undirsjóvartunlum og nýggjum tunlum á landi. Hvat sigur løgmaður so um tær avbjóðingar hetta hevur við sær fyri eitt nú tey mongu ungu, sum kunnu hugsast at fara at brúka størri part av tíðini í bili! Verður t.d. neyðugt at meiri politi á vegnum?

-Nú veit eg ikki, um politi er tað rætta. Eg eri í prinsippinum ímóti eini forboðsskipan, men eitt nógv størri veganet krevur av hvørjum einstøkum, bæði ungum og gomlum fyrst og fremst at taka ábyrgd av sær sjálvum og øðrum og vísa hesa ábyrgd í verki. Fara vit hinvegin og siga, at vit ikki tora at binda oyggjar saman, tí vit bera ótta fyri teimum negativu avleiðingum hetta kann hava, so læsa vit okkum inni og koma ikki víðari. Tað haldi eg er skeivur hugsunnarháttur.

Løgmaður heldur, at her hava ikki minst foreldrini stóra ábyrgd. -Tey mugu leggja niður í okkara unga fólk, at tað at vit fáa nakrar møguleikar og nøkur rættindi hevur eisini við sær, at tey taka á seg nakrar skyldur.

Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins:

## Gevur okkum heilt nýggjar møguleikar

UNDIRSJÓVARTUNNIL
*Jan Müller*



-Tað er ein gleði at hava verið ein partur av hesi verkætlanini sum lóggevari og játtandi myndugleiki, tí hon var jú fremmand, tá hon tók seg upp. Hon var tann fyrsta av sínum slag, og tí vóru tað nógv, sum ivaðust, um hetta bar til. Men tað hevur Vágatunnilin væl prógvað, at hetta er ein samferðslumøguleiki, sum nú stendur føroyingum púra opin og sum letur upp fyri heilt fantatiskum perspektivum fyri framtíðar samferðsluna í Føroyum, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, nú Vágatunnilin er tikin í nýtslu.

-Sum tann fyrsti av sínum slag fær Vágatunnilin allar føroyingar at síggja samferðslumøguleikarnar heilt øðrvísi enn vit higartil hava gjørt. Hetta er í veruleikanum at sammeta við, tá vit gjørdu fyrsta tunnilin á landi og teir stóru møguleikar, sum tá tóku seg upp. Frá tí at man bara hevði verið bundin at ferðast um sund við bátum og ferjum, bráddliga kundi hava aðrar møguleikar.

Jóannes Eidesgaard sær nú fyri sær eina natúrliga menning á samferðsluøkinum. -Nú kemur so túrurin til Lorvíksfjørð. Og hvør sigur, at man ikki eftir hetta, verða ráðini til tað, kann fara at tosa um fast samband um Skopunarfjørð! Og tað at Sandoyggin kemur uppí miðøkið ger teinin til Suðuroyar munandi minni.

Hvat viðvíkur tunnili til Suðuroyar heldur formaður Javnaðarfloksins, at tað tøkniliga helst ikki fer at vera nakar trupulleiki í framtíðini. -Tøknin mennist alla tíðina. Vit mugu minnast til, at tá bergholið millum Tvøroyri og Hvalba varð borað fyri 40 árum síðani, sótu menn fastspentir og boraðu við luftborum í hondini. Nú stendur ein maður og stýrir eini teldustýrdum borivogni. So møguleikin at bora tunnil undir Suðuroyarfjørð hevur kanska ongantíð verið so nær eftir, at vit hava fingið okkara fyrsta undirsjóvartunnil. Tá verður tað bara ein spurningur um longd. Tekniska menningin er so stór, at tær stóru forðingarnar fella ein fyri og onnur eftir sigur Jóannes Eidesgaard, sum heldur, at Vágatunnilin fer at geva føroyingum og tí føroyska samfelagnum nakrar heilt aðrar møguleikar.

# ítróttur

Nr. 240 • fríggjadagur • 13. desember 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## ÍSB-jólakappingar



*Svimjingin gekk fyri seg í Eysturskúlanum, og vóru tey luttakandi Júst í Túni, Magnus Vatnhamar Olsen, Símun Petur Zachariasen, Theodor Esmar Hansen, Beinta Sørensen, Halla Poulsen og Elvin Weihe*

**Um vikuskiftið hevði ÍSB sonevndu jólakappingarnar á skránni, og fyri tey luttakandi gjørdist talan um ein av teimu heilt hugnaligu døgunum**

JÓLAKAPPINGAR
*Jákup Mørk*

Um vikuskifti skipaði ÍSB fyri sonevndu jólakappingunum í svimjing og boccia. Svimjikappingin fór fram í Eysturskúlanum, meðan boccia-leikararnir kappaðust í Badminton høllini, og í alt tóku 35 fólk lut.

Frá ÍSB verður sagt, at kappingarnar í allar mátar hilnaðust sera væl, soleiðis at ásettu tiðarkarmarnir kundu haldast, umframt at luttakararnir sjálvsagt fingu ein góðan og hugnaligan dag burturúr. Umframt at tey trý fremstu í ymsu kappingunum fingu heiðursmerki, fingu allir luttakararnir luttøkuprógv, eins og Javni og MBM høvdu skipað fyri, at okkurt leskiligt var at fáa ímillum einstøku kappingarnar.

Úrslitini í kappingunum gjørdust hesi:

**Boccia, rorslutarnað**
1 Jógvan Telling Joensen
2 Jóannes Ziska
3 Marius Johansen

**Boccia, menningartarnað**
1 Elvin Weihe
2 Símun Petur Zachariasen
3 Theodor Esmar Hansen

**Boccia, Børn**
1 Hjørdis Jacobsen
2 Dánial Jákup Djurhuus
3 Martin Kristoffur Kristiansen

**50 m bringusvimjing**
1 Símun Petur Zachariasen

**17 m ryggsvimjing**
1 Halla Poulsen

**100 m frísvimjing**
1 Símun Petur Zachariasen

**17 m bringusvimjing**
1 Beinta Sørensen

**34 m frísvimjing**
1 Símun Petur Zachariasen
2 Júst í Túni
3 Elvin Weihe

**34 m bringusvimjing**
1 Júst í Túni

**34 m ryggsvimjing**
1 Elvin Weihe

## Fyrsta heiðursmerkið til Heidi

Hóast hon fyrst og fremst ætlaði at koma ígongd aftur eftir skaðasteðgin, sum hon hevur havt, so vann Heidi Andreasen longu í fyrstu kappingini í HM silvur.

Hetta hendi týsdagin, tá hon tók lut í 100 metra frísvimjing. Vinnarin av kappingini gjørdist ísraelska Keren Leybovitch, sum eisini vann gull á teininum í Sydney fyri tvemum árum síðani, men at Heidi megnaði at halda restina av feltinum aftan fyri seg, má metast sum einki minni enn eitt bragd.

Umframt kappingina ´i100 m frí, skal Heidi eisini taka lut í 50 og 400 metra frí, umframt 200 m blandaðari svimjing. Farið varð undir blandaðu svimjingina hósdagin, og frætta vit væntandi meira um úrslitini her seinni.

-jm

Mjølnir-Dráttur 3-0 (25-9, 25-13, 25-16):

## Mjølnir hongur í

**Mjølnir staðfesti triðjaplássið, tá tær uttan stórvegis hóvasták smurdu Drátt av**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var annars lagt upp til ein spennandi dyst í KÍ-høllini. Undan dystinum vóru liðini bæði ájøvn í stigum á triðja plássi. Ikki minst hevði Dráttur eftir eina heldur laka byrjan tikið seg nógv fram í seinastuni, har tað millum annað var blivið til sigur á ÍF. Hinvegin hevur Mjølnir verið í einum lítlum aldudali, men dysturin vísti týðiliga, at tær nú eru á veg upp úr hesum.

Dráttur fekk nevnliga ongan tíð somikið sum fótin fyri seg í dystinum, og í so máta tala tølini fyri seg.

**Batar at hóma**

Og sum vera man, so frøast Mjølnir leikararnir um, at tær loksins høvdu ein dyst, har spælið koyrdi soleiðis, sum tað alla tíðina hevur verið ætlanin. Serstaklia álopsparturin koyrdi væl, og tá Dráttur so samstundis ikki hevði ein av sínum bestu døgum, so funnu tær ongan tíð nakað hóskandi vápn móti ágangandi spælinum hjá heimaliðnum.

Og møguliga var hetta eisini eitt tekin um, at tað nú er um at koma vend í hjá Mjølni, sum higartil ikki hevur hvt ta úrtøkuna, sum tær eru vanar við at hava. Sum skilst hava leikarar og venjari havt eitt slag av eftirmeting um gongdina higartil, og har var í øllum førum semja um, at tað hevur ikki alt riggað, so sum tað átti at gjørt.

Ein einstakur dystur er kanska ov tung grundarlag til at meta, um Klaksvíkin við hesum aftur hevur lagt seg út í oddastríðið, men ein byrjan var hetta í øllum førum, og so mugu komandi dystirnir vísa, hvørt liðið megnar at halda fast um hetta framyvir.



*Mjølnir fekk loksins gongd á álopsspælið, sum vanliga eyðkennir liðið, og tá Dráttur ikki hevði ein av sínum góðu døgum, funnu tær ongan tíð nakað vápn ímóti hesum*